í stuttum

Lagt til rættis: Jákup Mørk

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***




**Elis og Jery Lee Lewis!**

»Og tit hava eisini stein-massasju?«

»Ja, tá verða steinarnir fyrst hitaðir til 54 stig«

*Elis á vitjan hjá Cosméto í Góðan morgun Føroyar*

**Skulu tey bíða, til marknaðurin steingir?**

»Venjarin hjá enska Premier League liðnum Reading ásannar, at feløgini keypa ov nógv, meðan spælaramarknaðurin er opin«

*Lisið í Dimmalætting*

**Neyðars ákærdi**

»…kravdi ákærin, at maðurin fekk tríggjar daga treytaleysa fongsulsrevsing. Verjin metti hinvegin, at grundarlag var ikki fyri meira enn 60 daga fongsul.«

*Lisið í Sosialinum*

## Orðaspæl

Skulu tey, sum duga at svimja, hava uppihaldsloyvi fyri at halda sær uppi?

# »Ljóskrúss« ella »ljóskurv« í Vágsbotni?




*Ljós krúss*

Í Vágsbotni er eitt vegamót við nógvari ferðslu, har ikki minni enn fimm vegir krossast. Í meldurtíðini hevur hetta ofta stóran ferðsluruðuleika við sær.

Fyri at stýra nógvu ferðsluni er ein møguleiki at sett "ljós krúss" á vegamótið ella tað kundi verið ein "ljós kurv"

Vit halda, at tað avgjørt er ein fyrimunur at hava "ljós krúss" ella "ljós kurv", sum síggjast væl í myrkri, ístaðin fyri "myrk krúss" ella eina "myrka kurv".

mg



*Ljós kurv*



Sosialurin

## *Er alt komið upp á pláss?*